# EB/Streymur

**EB/Streymur**
**FO-470 Eiði**
**www.eb-streymur.fo**

**STOVNAÐ**
**23.01.1993**

**FORMAÐUR**
**Rólant Højsted**

**MEISTARAR**
**Ongantíð. Besta úrslitð nr 2 í 2006 og 2007**

**STEYPAVINNARAR (1)**
**2007**

**GREIPUVINNARAR**
**Ongantíð**

**Í 1. DEILD (8 ár)**
**1994 og 2001-**

**Í EUROPA (1)**
**UEFA Cup 2007/08**

## Nú er bara eitt stig eftir

**Einki uttan gullið verður nóg gott hjá steypavinnarunum og silvurvinnarunum, sum hava trimmað seg við fleiri nýggjum spælarum og væl royndum og væl útbúnum venjarapari**



*Av fleiri verður spátt, at tað er nú, at EB/Streymur skal taka sær gullið*

Í fyrra árið mistu teir í EB/Streymi á stokkinum, tá ið krónurnar eftir lítlari løtu fóru frá at vera úr gulli og til at vera úr bronsu.

Í fjør spældu teir seg fram til silvurkrónurnar, og í steypakappinginini eydnaðist tað fyri fyrstu ferð at vinna Løgmanssteypið.

Nú er bara eitt tak eftir hjá samansetta liðnum, sum eigur heimavøll í Streymnesi. Tað er at vinna FM heitið.

Áskoðararnir eru eldhugaðir og fylgja væl við, og nevndin hevur í vetur syrgt fyri, at fyritreytirnar at taka stigið upp á fótbóltsliga Slættaratindin eru so góðar, sum tær ongantíð hava verið áður.

Eftir framúr úrtøku í fleiri ár hevur væl umtókti Piotr Krakowski biðið farvæl. Nýggjur í venjarastólinum er Sigfríður Clementsen, og hjálparvenjari er Magni Mohr. Báðir eru teir væl útbúnir, og í B36 hava teir víst, at tað svingar, tá ið teir arbeiða saman.

Um tað ikki eydnast at røkka heilt upp á tindin, so ber illa til at skjóta seg undir, at manningargrundarlagið ikki er nóg gott. Heldur ikki sjálvt um miðvallargeneralurin Ronnie Samuelsen hevur biðið farvæl í fremstu røð, og hóast vinstri vongverjin John Heri Dam er farin, og onkur annar eisini ikki verður at síggja aftur í strípututroyggjuni. René, Egil, Marni, Gert, Bárður, Hans Pauli, Sorin, Hanus og allir hinir eru framvegis har.

Miðvallarstyrkurin er komin við tveimum spælarum, sum Sigfríður Clementsen áður hevur verið venjari hjá. Teir eru Høgni Zachariassen úr Fuglafirði, og Mikkjal Thomassen, sum seinastu árini hevur verið so væl fyri í B36, at hann tykist eiga fast pláss á landsliðnum.

Í fjør var vandamikli álopsspælarin Arnbjørn Hansen leingi darvaður av skaða. Nú er hann komin seg heilt, og tað er sannur fongur.

At tað verður dýrt, um teir, ið ætla sær heilt niðan á tindin, ikki halda bæði tungu og taklingar í tjóðri, varð undirstrikað, tá ið EB/Streymur sum steypavinnari var annar parturin av steypadysti á ovara vølli í Gundadali. Meistararnir í NSÍ vóru mótstøðuliðið, og tað var tætt í 1. hálvleiki, sum endaði málleysur. Men í síðstu løtu fyri hvíldina varð Mikkjal Thomassen rikin av vølli, og í 2. hálvleiki skrædnaði tað so illa hjá EB/Streymi, sum tað ikki hevur verið at sæð fleiri tey seinastu árini.

Fyrsta treytin fyri góðum úrsliti er, at tað eru ellivu á vøllinum. Tað vita venjararnir, og teir eiga at vera førir fyri at syrgja fyri, at spælararnir ikki leypa framav. Tað eru ikki ráð til annað, um síðsta stigið upp á toppin skal takast í ár.

| MÁLVERJAR | Áður spælt við |
| --- | --- |
| Gunnar á Steig | KÍ, B68 |
| René Tórgarð | B36 |
| Brian Hansen | |
| **VERJULEIKARAR** | |
| Bárður Olsen | |
| Marni Djurhuus | |
| Egil á Bø | ÍF, B36 |
| Fróði Clementsen | B36, AB, B68 |
| Dánjal Davidsen | HB |
| Gert Hansen | |
| Tonny Kruse | |

| MIÐVALLARAR | Áður spælt við |
| --- | --- |
| Mikkjal Thomassen | HB, B36, B68 |
| Levi Hanssen | B36, Skála |
| Hans Pauli Samuelsen | |
| Høgni Zachariassen | ÍF |
| Esmar Eiðisgarð | |
| Brian Olsen | |
| **ÁLEYPARAR** | |
| Hanus Eliasen | ÍF |
| Sorin Anghel | |
| Arnbjørn Theodor Hansen | |
| Leif Niclasen | |
| Marcell Balog | |

**TILGONGD**
Gunnar á Steig
Fróði Clementsen
Dánjal Davidsen
Mikkjal Thomassen
Levi Hanssen
Marcell Balog

**FRÁGONGD**
Símun Eliasen, givin
Karoly Potemkin

**VENJARAR**
Sigfríður Clementsen
Magni Mohr